# Álit

# í

**løgtingsmáli nr. 115/2014: Uppskot til ríkislógartilmæli um at seta í gildi fyri Føroyar Lov for Færøerne om kapitalkrav og tilsynsmæssige krav for investeringsselskaber**

Landsstýrismaðurin í fíggjarmálum hevur lagt málið fram tann 6. mars 2015, og eftir 1. viðgerð 10. mars er tað beint Fíggjarnevndini.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundum tann 12. mars og 7. og 8. apríl 2015.

Undir viðgerðini hevur nevndin havt fund við Felagið fyri Peningastovnar, løgmann og landsstýrismannin í fíggjarmálum.

Nevndin hevur undir viðgerðini býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

**Meirilutin** (Bárður Nielsen, Jákup Mikkelsen, Rodmundur Nielsen, Bill Justinussen, Aksel V. Johannesen og Eyðgunn Samuelsen) vísir á, at uppskotið er ein liður í at tryggja, at lóggávan undir føroyska bankakervinum samsvarar við lóggávuna í Danmark og í ES. Meirilutin vísir á, at bankalóggáva verður alsamt meira alheimsgjørd, og nógv av teimum lógarkrøvum, ið koma til okkara umvegis Danmark, hava sín uppruna í leiðreglunum, ið verða ásettar í BIS (Bank of International Settlements).
Hesar leiðreglurnar komu í kjalarvørrinum av fíggjarkreppuni og hava til endamáls at styrkja um fíggjarfyritøkur soleiðis, at tað almenna í størst møguligan mun sleppur undan at bjarga hesum, tá fíggjarkreppur stinga seg upp.

Neyðugt verður, at lóggávan kemur í gildi í Føroyum, tí annars kann tað hava við sær, at kostnaðurin at fáa til vega gjaldføri og kapital gerst dýrari fyri føroyskar peningastovnar, sum aftur kann hava við sær dýrari fígging til húsarhald og fyritøkur.

Leisturin við at ein serlóg, ið setir eina ES-fyriskipan beinleiðis í gildi í Føroyum, er ikki áður royndur. Tað er tó komið fyri, at ríkislógartilmæli, ið vísir til ES-fyriskipan, er sett í gildi í Føroyum. T.d. løgtingsmál nr. 60/2014: Uppskot til ríkislógartilmæli um at seta í gildi fyri Føroyar "Anordning om ikrafttræden for Færøerne af en række love om ændring af patentloven, og Rådets forordning (EF) nr.2100/94 af 27. juli 1994 om EF- sortsbeskyttelse, artikel 5 og artikel 14", og løgtingmál nr. 89/2007: Uppskot til ríkislógartilmæli um at seta í gildi fyri Føroyar "årsregnskabsloven".

Landsstýrismaðurin í fíggjarmálum hevur greitt nevndini frá, at lógin er ikki ein standandi heimild. Verða broytingar framdar í ES-fyriskipanini, skulu hesar fyri Løgtingið og Fólkatingið, áðrenn tær kunnu setast í gildi í Føroyum. Skulu aðrar ES-fyriskipanir á bankaøkinum setast í gildi í Føroyum, er somuleiðis neyðugt við nýggjari lóg.

Esini hevur landsstýrismaðurin greitt nevndini frá, at Lógartænastan mótvegis Fíggjarmálaráðnum hevur givið til kennar, at í teimum førum, har tað í fyriskipanini verður víst til aðrar fyriskipanir, sum ikki eru í gildi í Føroyum, hava slíkar tilvísingar ikki virknað í Føroyum, júst tí tann lóggáva, víst verður til, ikki er í gildi her.

Tað verður framvegis danska Fíggjareftirlitið, ið hevur eftirlit við føroysku bankunum, og ES-stovnar fáa ikki heimildir til at virka í Føroyum.

Meirilutin tekur undir við málinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

**Minnilutin** (Kristina Háfoss) mælir Løgtinginum frá at taka undir við hesum ES-lógarpakka í verandi líki og mælir Løgtinginum til í minsta lagi at bíða við at taka undir við hesum málum (115, 116 og 117/2014), til landsstýrið og Løgtingið vita, hvat málini merkja innihaldsliga og løgfrøðisliga. Hetta er neyðugt, tí í verandi løtu vita hvørki landsstýrið ella Løgtingið, hvørjar avleiðingarnar verða av uppskotunum.

Hartil kemur, at í verandi uppskotum, ið landsstýrið hevur lagt fyri Løgtingið, eru álvarsom inntriv og stór ivamál. Talan er um eitt stórt og umfatandi lógarverk, har lógarbroytingar og viðmerkingar eru samanlagdar 1.620 síður.

Landsstýrið lurtar ikki eftir løgfrøðiligu ráðgevingini hjá landsstýrinum
Hoyringssvarini til málið frá leiðandi løgfrøðingi hjá Løgmansskrivstovuni og frá Lógardeildini hjá landsstýrinum ávara eisini um fleiri viðurskifti í sambandi við málið. Tað er gott at løgfrøðingarnir vísa á hetta, men tað er óskiljandi, at landsstýrið – hóast álvarsomu viðmerkingarnar – ikki tekur hesar fyri fult, og ikki tekur hesar í tí álvara, ið tær áttu at verið tiknar. Í hesum máli noktar landsstýrið at lurta eftir egnari løgfrøðiligari ráð-geving.

Víst verður m.a. á, at uppskotið flytur lóggávuvald frá Løgtinginum til danskan ráðharra. Víst verður orðarætt m.a. á:

- "... man loypur á bláman við § 1 og hopar tað besta. Við § 2 og § 3 gevur man ein serdeilis víðan blankokekk til danskt ministerium uttan nakran kontroll frá føroyskari síðu við, hvat hendir".

- "Vit eru her á veruligari "tekniskt juridiskt" ótryggari grund, sum ikki gerst minni ótrygg av, at vit vanligu juristar ikki duga at lesa tekstin."

- "Satt at siga ræðist eg lógaruppskotið, tí tað kann skapa fyridømi fyri øðrum økjum í Føroyum og kann gera eina óyvirskoðiliga jurdiska junglu, sum vit ikki finna runt í. Okkum manglar, at klókastu juridisku heilarnir í ríkinum innan ES-rætt, danskan statsforfatningsrætt og serføroysk viðurskifti gera eitt grundleggjandi álit um, hvussu vit hondtera støðuna, har Danmark so at siga fer burtur úr ríkinum, og bara vit eru eftir."

- "Er ætlanin, at ES stovnar skulu hava beinvegis heimildir í Føroyum?".

Lógardeildin hjá landsstýrinum sigur eisini:

- "Vit hava ikki fakligan førleika at gera viðmerkingar til uppskotið innihaldsliga, so sum um tað er neyðugt ella skilagott at seta eitt so umfatandi regluverk í gildi í Føroyum".

- “Soleiðis sum § 2 er orðað, er tað ráðharrin, sum ásetir hesar reglur í kunngerð, ikki í anordning ... t.v.s. hesar reglur kunnu setast í gildi, uttan at Løgtingið skal viðgera hesar fyrst”.

- “Avgerðir og rættarskjøl hjá ES-stovnum o.líkn. sambært ES-fyriskipanini, kunnu ikki galda beinleiðis í Føroyum. Tað er tí í § 3 ásett, at ráðharrin við kunngerð kann áseta tílíkar reglur, sum eru neyðugar fyri at fremja slíkar avgerðir og rættarskjøl”.

Flyta lóggávuvald frá Løgtingi til danskan ráðharra
Hesin lógarpakki ávirkar tí eisini lóggávuvald Løgtingsins. Tí hetta gevur einum donskum ráðharra sera víðfevnda heimild at seta í verk ES-reglur og avgerðir hjá ES-stovnum í Føroyum – við kunngerð! Tí danski ráðharrin fær heimild bæði til at seta ES-reglurnar í gildi fyri Føroyar, og at fremja broytingar í hesum, frameftir.
Hetta eigur Løgtingið ikki at góðtaka. Tí við hesum verður ES lóggáva sett í verk í Føroyum gjøgnum bakdyrnar. Sær út til, at landsstýrið enntá letur dyrnar upp við “bindi fyri eyguni”, tí landsstýrið veit ikki, hvat uppiskotið merkir innihaldsliga og heldur ikki løgfrøðisliga.
Vit síggja eisini í hesum lógaruppskotum ásetingar, ið eru orsakað av breiðum semjum millum donsku politisku flokkarnar. Gjørd eru sokallað “forlig” ella breiðar semjur á fíggjarliga økinum. Samstundis hava føroysku politisku flokkarnir als ikki fingið møguleika at viðgera málið, áðrenn hetta varð lagt fyri Løgtingið. Kann hetta góðtakast av politisku flokkunum?

Danmark flytur fíggjarliga lóggávu og eftirlit til ES - hvat hendir við Føroyum?
Tað at Danmark flytur sítt lóggávuvald fyri peningastovnar til ES, meðan Føroyar - ið eru uttan fyri ES - framhaldandi hava latið lóggávuvaldið fyri føroyskar peningastovnar til Danmark, ger støðuna ómetaliga fløkta.
Heldur enn at viðgera hesa støðu og halda seg til, at neyðugt er at finna ein leist, ið er varandi og nøktandi fyri lóggávu fyri peningastovnar, ið virka í Føroyum, so leggur landsstýrið hetta uppskotið fyri Løgtingið, ið landsstýrið ikki sjálvt kennir innihald og avleiðingar av. Og samstundis verður rykt eftir uppskotinum í danska Fólkatinginum, tí tey har skulu samtykkja hesa lóg fyri Føroyar. Tað tykist sum samgonguflokkarnir tí ikki vilja geva málinum neyðugu viðgerðina.

ES-fyriskipanin kemur nevniliga av sær sjálvum í gildi í Danmark, men fyri at henda skal galda fyri Føroyar, skal Fólkatingið samtykkja lóg um hetta. Og áðrenn Fólkatingið samtykkir lóg um hetta, skal Løgtingið blástempla málið og við hesum uppskotum geva donskum ráðharra fulla heimild at seta í verk ES-reglur í Føroyum – við kunngerð.

Markamót – hvat er galdandi?
Nógv markamót eru, ið ikki eru greinað í sambandi við lógaruppskotini. Ein av nógvu ásetingunum í lógaruppskotunum er krav til varskógvaraskipan. Framefir skulu bankar í Føroyum hava varskógvaraskipanir, har starvsfólk dulnevnt skulu kunna fráboða um óreglusemi. Hetta er gott og gagnligt. Men fráboðast  skal til skipan, ið er góðkend av Datatilsynet. Víst verður m.a. í viðmerkingunum til, “samtidig hører tilladelse til behandling af personsoplysninger i forbindelse med virksomhedens whistleblowerordning samt tilsyn hermed fortsat under Datatilsynets kompetence”. Men her hava vit jú heimtikið ábyrgdina. Vit hava føroyska persónsupplýsingarlóg, og vit hava føroyskt Dátueftirlit. Hvussu skulu bankar í Føroyum bera seg at í mun til donsku ella føroysku persónsupplýsingarlógina? og í mun til danska ella føroyska Dátueftirlitið?

Tryggingarøkið verður eisini fevnt av hesi lógini, men vit hava føroyska lóg fyri tryggingarvirksemi. Hvør lóg er tá galdandi – tann føroyska ella henda ES-lóggávan, ella báðar?
Eisini verður víst til stórt tal av ES-fyriskipanum, ið ikki eru í gildi í Føroyum, eins og ein røð av ES-stovnum fáa heimildir í lógini.

Tað er upplýst í Fíggjarnevndini, at har tað verður víst til ES-fyriskipanir, ið ikki eru settar í gildi fyri Føroyar, so eru ásetingarnar ikki galdandi í Føroyum. Men er hetta rætt? Tí tá spurt verður, hvat so er galdandi – ella um nakað er galdandi – so fæst einki svar.

Tað sæst tó týðiliga í málinum, at øll ES-fyriskipanin er grundað á eitt ovurstórt tal av ES-fyriskipanum og ES-avgerðum. Hesar eru fyritreytir fyri hesum lógaruppskotinum. Um allar hesar tilvísingar ikki skulu verða galdandi – so er trupult at síggja, hvat er eftir av lógaruppskotinum.

Veruleikin er tí tann, at um Løgtingið samtykkir hesa lóg, so verður samstundis samtykt eitt stórt tal av ES-reglum og -avgerðum, ið vit ikki kenna innihaldið av.

<u>Hvussu megna føroysku bankarnir herdu solvenskrøvini?</u>
Hesin lógarpakkin hevur m.a. ásetingar til teir bankar, ið skulu gerast partar av sokallaðu serliga týðandi bankunum – SIFI-bankunum.

Tað er væl skiljandi, at peningastovnarnir ynskja at gerast partur av hesi "tryggingarskipan fyri bankar", og at teir tí eisini ynskja, at henda lóggávan verður sett í verk. Men neyðugt er, at bæði landsstýrið, Løgtingið og fíggjargeirin til fulnar kenna innihaldið og avleiðingarnar av lóggávuni.

Tíverri má staðfestast, at eingin lýsing er av, hvørji ítøkilig solvenskrøv verða til føroysku bankarnar, ið gerast SIFI-bankar.

Heldur ikki er nøkur lýsing av, hvussu langt føroysku bankarnir eru frá at røkka herdu krøvunum, herundir hvørjar avleiðingar herdu krøvini kunnu fáa fyri føroyska fíggjarmarknaðin, m.a. øktan kostnað fyri bankakundar, tí bankarnir skulu hava meira í kapitali v.m. Hinumegin verður tað væntandi ein fyrimunur fyri teir bankar, ið mugu út at endurfíggja lán, at teir helst fáa møguleika at lána kapital til lægri rentu, um teir gerast SIFI-bankar.

Heldur ikki verður upplýst nakað um, hvør kostnaðurin verður fyri bankarnar, og harvið kundar bankanna, at luttaka í hesi "tryggingarskipan". Hartil manglar kunning um, hvussu Føroyar frameftir fáa ávirkan á og umboðan í eini tílíkari "tryggingarskipan fyri bankar".

<u>Hvussu handfara vit ES-lóggávu nú og frameftir?</u>
Hesi lógaruppskot, har ES lóggáva verður sett í verk fyri Føroyar, verða ikki tey seinastu. Tað er tí alneyðugt, at vit gjølla viðgera, hvønn leist vit ynskja á hesum øki frameftir. Hesin leistur, ið landsstýrið hevur valt í hesum máli, kann undir ongum umstøðum vera tann rætti. Tí tað kann ikki vera rætt, at Løgtingið gevur frá sær alla heimild til danskan ráðharra. Hinvegin ber heldur ikki til at umseta alla ES-lóggávu til føroyskt. Tí má millumvegur finnast, ið m.a. tryggjar:

1. At landsstýri og Løgting til fulnar kenna innihaldið í tí lóggávu, ið verður sett í verk fyri Føroyar.
2. At hetta verður gjørt á ein hátt soleiðis, at tað fyrisitingarliga og løgfrøðisliga ber til at umsita, seta í verk og at broyta frá føroyskari síðu.

3. At full greiða er á, hvussu farið verður fram, har markamót eru millum føroyska lóggávu og ES-lóggávu, so eingin ivi verður um, hvat er galdandi fyri fólk og fyritøkur í Føroyum.
4. At tryggjað verður, at Løgtingið ikki gevur frá sær lóggávuvald.

Hvat gera grannalond okkara?
Fíggjarnevndin bað Løgmansskrivstovuna og løgmann um at koma við frágreiðing m.a. um, hvussu grannalond okkara handfara fíggjarligu lóggávuna við atliti til ES-lóggávu. Enn hava vit tó ikki fingið nakra frágreiðing. Málið er tí ikki búgvið at koma til atkvøðugreiðslu í Løgtinginum.

Munnliga er fingið upplýst, at í Íslandi eru 14 fólk, ið arbeiða við at umseta og greina hesa lóggávu, ið vit nú hava fingið til viðgerðar í Føroyum. Sum skilst, er ætlanin, at málið verður lagt til viðgerðar og samtyktar í Íslandi í heyst.

Eiga at byggja upp ES-serfrøði í miðfyrisitingini
Tað er sjálvandi neyðugt, at landsstýrið tryggjar sær neyðuga serkunnleikan, og neyðuga innlitið í avleiðingarnar, áðrenn ES-lóggáva verður sett í verk her í Føroyum. Tí annars enda vit í eini støðu, har Løgtingið setir í verk lóggávu, ið vit ikki kenna avleiðingarnar av, og sum landsstýrið ikki er ført fyri at umsita eftirfylgjandi, og borgarar og fyritøkur ikki vita, hvussu tey skulu bera seg at.

Tí er alneyðugt beinanvegin at taka stig til at styrkja lógardeildina í miðfyrisitingini við fólkum við serkunnleika innan ES-lóggávu og ES-rætt.

Løgmaður svarar ikki skrivligum spurningi um málið
Fyri at fáa lýst málið meira, enn møguligt var í Fíggjarnevndini, varð spurningur settur løgmanni um málið. Tað hendi tó tað sera óvanliga, at løgmaður noktar at svara §52a spurningi (nr.70/2014) um málið. Havi ikki upplivað hetta áður. Skal málið ikki kunna upplýsast til fulnar, áðrenn atkvøtt verður á Løgtingi? Tað tykist sum um, at her er nakað, ið ikki skal verða upplýst fyri Løgtinginum, áðrenn atkvøtt verður um málið. Kennist ikki serliga fólkaræðisligt. Hevði ynskt, at formansskapurin í Løgtinginum frameftir áleggur landsstýrinum at svara spurningum frá løgtingsfólkum.

Sum heild er málið alt ov illa lýst, og greitt er, at landsstýrið leggur lóg fyri Løgtingið, ið landsstýrið ikki kennir avleiðingarnar av.

Vil tí mæla Løgtinginum til, í minsta lagi, at bíða við at taka undir við hesum málum (115, 116 og 117/2014) til landsstýrið og Løgtingið vita, hvat málini merkja innihaldsliga og løgfrøðisliga. Herundir er neyðugt at fáa greiðu á, hvørjir partar skulu setast í gildi í Føroyum, og hvørji ikki skulu setast í gildi í Føroyum, og hvussu vit seta tílíkar reglur í gildi. Neyðugt er tí at útseta hesi mál, so hesi verða veruliga viðgjørd, lýst og greinað nærri. Um neyðug arbeiðsorka verður sett av, ber helst til at fáa málini greinað og klár til á ólavsøku ella í heyst.

Minnilutin tekur ikki undir við málinum og mælir Løgtinginum frá at samtykkja málið.

**Fíggjarnevndin, 16. apríl 2015**

| | | |
|---|---|---|
| Bárður Nielsen<br>formaður | Kristina Háfoss<br>næstformaður | Bill Justinussen |
| Jákup Mikkelsen | Rodmundur Nielsen | Eyðgunn Samuelsen |

Aksel V. Johannesen